**Røða løgmans í Dómkirkjuni**

Seinni heimsbardagi er ein skakandi táttur í okkara siglingarsøgu. Ein sorgarsøga av teimum stóru. Hóast Føroyar ikki beinleiðis vóru við í krígnum, so var tjóð okkara týðiliga merkt av hesum ræðuleikum. Sjómenn okkara sigldu vandasjógv til frama fyri land og fólk. Í landsins tænastu. Tí tað var neyðugt at sigla fyri at breyðføða fólkið og skapa liviligari kor í landinum.

Sum oyggjaland mitt úti í Norðuratlantshavi vita vit, hvat tað inniber at hava havið sum granna. Vita, at havið er góður tænari. Men havið kann eisini vera ein kargur og óunniligur harri.

Undir seinna heimsbardaga mistu vit hópin av fólki á sjónum, og stig vórðu tikin til at halda minningargudstænastur fyri teimum sjólátnu.

Eitt árið undir krígnum vórðu nøvnini á ikki færri enn seksti sjómonnum lisin upp undir minningarguðstænastu her í Havnar kirkju!

Í tølum kunnu vit síggja teir sorgarleikir, sum fóru fram her hjá okkum og kring heimin, tá ið allur heimurin var í bardaga. Hetta eru ræðandi tilburðir og tøl. Í alt 213 føroyingar doyðu í vandasigling, og eftir sótu nógvar ungar einkjur og faðirleys børn.



3

Sorgina í mongum heimum í Føroyum kunnu vit kortini ikki gera upp í tølum. Sorgin er eisini trupul at seta orð á. Svári missurin, sum nógvir av landsmonnum okkara og teirra avvarðandi hava kent av øllum tí, sum fór fram undir krígnum, hevur verið stórur. Sárini á sálina kunnu vit heldur ikki gera upp í tølum.

Tíðarskeiðið 1940 til 1945 hevur sett djúp sár eftir seg.

Eftir seinna heimsbardaga samtykti Løgtingið, at allahalgannadagur, ið er ein aldargamal minningardagur, skuldi haldast sum minningardagur teirra sjólátnu. Samtyktin sigur ikki bara nakað um umstøðurnar her í Føroyum. Samtyktin sigur eisini nakað um samanhaldið millum fólk okkara. At tá ið á stendur, og sorgin og deyðin vitja, tá hyggja vit ikki burtur. Vit standa saman við teimum, sum hava mist, og vísa teimum virðing og stuðul.

Kring landið hava vit eisini prýðiligar minnisvarðar, sum boða frá takksemi og virðing fyri teimum, sum farin eru á sjónum. Í 1956 var reistur stórur minnisvarði í viðarlundini í Havn at minnast teir, sum fórust bardagaárini.

Í Klaksvík er minnisvarði reistur, og tá ið Christianskirkjan varð vígd í 1963, varð minnistalva hongd upp í kirkjuni við áskriftini: "Veri henda kirkja vígd minnið um teir føroysku sjómenninar, ið lótu lív á havinum í bardagaárunum 1939-1945."

Enn tekur havið kring Føroyar fólk frá okkum.

Tað er mín vón, at vit vísa hesum minningardegi størstu virðing og sóma, sum tað sømir seg eini siglandi tjóð – tað veri seg í fiskivinnu, oljuvinnu ella aðrari vinnu. Føroyar fara altíð at hava havið sum sín nærmasta granna.

Við hesum orðum fari eg vegna Føroya landsstýri og alla ta føroysku tjóðina at lýsa frið yvir minni teirra, ið fórust undir seinna heimsbardaga.